At senda til TAKS

Sí vegleiðing til at útfylla
Frámeldingarskjalið á s.3-4

TAKS
Postrúm 2151
FO-165 Argir

# Frámeldingarskjal
## Uppathald/avhending

**1. Virkið:**

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og nr.: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |

**2. Eigari higartil:**

| |
|---|
| Navn: |
| Gøta og nr.: |
| Postnr. og bygd/býur: |

**3. Virkið ynskir at verða frámeldað:**

| | |
|---|---|
| ☐ Mvg: | ☐ Alt skal strikast |
| ☐ Lønhæddaravgjald: | ☐ Annað: |

**4. Virkið hildið uppat:**

| |
|---|
| Uppathildið tann / 20 Um virkið er selt ella verður rikið av øðrum, skal teigur 5 útfyllast. |

**5. Virkið avhendað:**

| | | |
|---|---|---|
| ☐ Avhending | ☐ Latin til uppisitara | Tann / 20 |
| Nýggjur eigari ella uppsitari: | | V-tal: |
| Gøta og nr.: | | |
| Postnr. og bygd/býur: | | |

**6. Vørugoymsla:** ☐ ja ☐ nei Um ja, svara niðanfyri standandi spurningum

| | |
|---|---|
| **a.** Um vørugoymslan er seld sum liður í eini avhending av vikrinum **uttan** MVG, hvat er tá søluprísurin ? | Søluprísurin uttan mvg.: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **b.** Um vørugoymslan er avhenda **við** MVG, hvat er tá søluprísurin ? | Søluprísur við mvg.: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **c.** Hevur eigarin yvirtikið vørugoymslu/partar av henni til egið brúk ella annað brúk, sum ikki er meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi? ☐ ja ☐ nei | |
| Um ja, hvat er keyps- ella framleiðsluprísurin uttan meirvirðisgjald ? | Keypsprísur kr.: |

## 7. Maskinur og onnur rakstrargøgn: ☐ ja ☐ nei Um ja, svara niðanfyri standandi spurningum

| | |
|---|---|
| **a.** Um maskinur og onnur rakstrargøgn eru seld sum liður í eini avhendig av virkinum **uttan** mvg, hvat er tá søluprísurin uttan MVG? | Søluprísur uttan mvg: |
| Navn og á keypara: | V-tal: |
| **b.** Um sølan av rakstrargøgnum hevur verið **við** MVG, hvat er tá søluprísurin við MVG? | Søluprísur við mvg: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **c.** Um eigari hevur yvirtikið maskinur og onnur rakstrargøgn/íløgugøgn til privata nýtslu, hvat er tá keyps-og framleiðsluvirðið eftir avskriving ? | Keyps-og framleiðsluvirðið: |
| **d.** Skal javnast fyri áður frádrigið mvg? ☐ ja ☐ nei | |
| **e.** Yvirtekur keyparin alla javningarskyldu? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **f.** Yvirtekur keyparin bert ein part av javningarskylduni? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **g.** Hevur seljarin nakað at javna? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |

## 8. Føst ogn: ☐ ja ☐ nei Um ja, svara niðanfyri standandi spurningum

| | |
|---|---|
| **a.** Hevur virkið sum eigari/leigari frádrigið keyps-MVG og/ella yvirtikið skyldu at javna føstu ognina, sum er bygd (møguliga umbygd ella uppíbygd) innanfyri tey seinastu 10 roknskaparárini? ☐ ja ☐ nei | |
| **b.** Skal javnast fyri áður frádrigið mvg? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |
| **c.** Yvirtekur keypari **alla** javningarskylduna? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |
| Navn á keypara: | V-tal: |
| **d.** Yvirtekur keypari **partvíst** javningarskylduna? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |
| **e.** Hevur seljarin nakað at javna? ☐ ja ☐ nei | Um ja, upphædd at javna: |

## 9. Annað:

| |
|---|
| Serligar viðmerkingar, til dømis um føst ogn ella rakstrargøgn eru seld á tvingsilssølu: |

Skal keyparin javna sambært pkt. 7e, 7f, 8c og 8d, skal váttan (skjal M 38) í samband við yvirtøku av skyldu at javna, viðleggjast.

____________________ , tann / 20 ____________________

Staður Undirskrift hjá frámeldara

# Vegleiðing til at útfylla frámeldingarskjal

**Teigur 1 - Virkið**
Navn og bústaður hjá virkinum, sum heldur uppat, skulu upplýsast.

**Teigur 2 - Eigari higartil**
Navn og bústaður hjá eigara av virkinum skal upplýsast.

**Teigur 3 - Virkið ynskir at verða frámeldað**
Upplýsast skal, hvat virkið ætlar at frámelda seg fyri. Um virkið heldur uppat fyri MVG-skyldu, skulu teigarnir 6, 7 og 8 altíð útfyllast.

**Teigur 4 - Virkið hildið uppat**
Dagfestingin, nær virkið heldur uppat.

Teigur 5 skal útfyllast, um virkið verður selt ella rikið av øðrum.

**Teigur 5 - Virkið avhendað**
Dagfestingin av avhendingini, ella nær uppsitarin yvirtekur virkið, skal upplýsast. Navn og bústaður hjá viðkomandi skal upplýsast.

**Teigur 6 - Vørugoymsla**
Um vørugoymslan verður seld sum liður í eini avhending av virkinum til eitt MVG-skrásett virkið, skal einki MVG verða á søluni. Søluprísurin uttan MVG, navn og V-tal á keypara skal skrivast í teig 6a.

Um vørugoymslan verður seld til ikki-skrásett virksemi, ella sølan ikki er liður í eini avhending, skal MVG vera á søluni. Søluprísurin við MVG, navn og V-tal skal skrivast í teig 6b. Sølu-MVG'ið av hesum skal á MVG-uppgerðina (skjal M03).

Yvirtekur verandi eigari vørugoymsluna ella part av henni til egna nýtslu, ella onnur endamál, sum ikki eru meivirðisgjaldskyldug, skal meirvirðisgjald roknast av keyps- ella framleiðsluprísi uttan meirvirðisgjald. Keyps- ella framleiðsluprísurin skal setast í teig 6c. Meirvirðisgjald av keypsprísinum, skal setast á sølu-MVG'ið á MVG-uppgerðini.

**Teigur 7 – Maskinur og onnur rakstrargøgn**
Um rakstrargøgn verða seld sum liður í eini avhending av virkinum til eitt MVG-skrásett virkið, skal onki MVG vera á søluni. Søluprísurin uttan MVG, navn og V-tal á keypara skal skrivast í teig 7a.

Um rakstrargøgn verða seld til ikki-skrásett virksemi ella sølan ikki er sum liður í eini avhending, skal MVG vera á søluni. Søluprísurin við MVG, navn og V-tal á keypara skal skrivast í teig 7b. Sølu-MVG'ið av hesum skal á MVG-uppgerðina (skjal M03).

**Rakstrargøgn verða yvirtikin til privata nýtslu**
Yvirtekur verandi eigari rakstrargøgn til egna nýtslu, sum liður í avhending av virkinum, skal meirvirðisgjald roknast av keyps- ella framleiðsluprísi uttan meirvirðisgjald. Keyps- ella framleiðsluprísurin skal setast í teig 7c. Meirvirðisgjald av keypsprísinum, skal setast á sølu-MVG'ið á MVG-uppgerðini.

Sum vegleiðing skal meirvirðisgjaldið roknast við grundarlagi í keypsprísinum (u/MVG) lækkaðum við 20% av keypsprísinum fyri hvørt **heilt** ár, ið er liðið síðani keypsdagin.

**Dømi:**
Keypsdagurin av rakstrargagninum: 15. juni 2001
Dagurin, har rakstrargagnið fer til eigaran: 10. apríl 2004

| | | |
|---|---|---|
| Keypsprísurin u/MVG | kr. | 20.000 |
| Lækkaður keypsprísur við 20% í ár 2002 | kr. | 4.000 |
| Lækkaður keypsprísur við 20% í ár 2003 | kr. | 4.000 |
| Meirvirðisgjaldsvirðið í ár 2004 | kr. | 12.000 |
| Sølu-MVG 25% | kr. | 3.000 |

Meirvirðisgjaldsvirðið (dømi her) á kr. 12.000 skal setast í teig 7c. Meirvirðisgjald av keypsprísinum (dømi her) á kr. 3.000, skal setast á søluMVG'ið á MVG-uppgerðini.

Lækkingin upp á 20% má tó bert nýtast viðvíkjandi rakstrargøgnum, ið eru undir virðisminking.

Meirvirðisgjald av rakstrargøgnum, ið ikki eru undir virðisminking, skulu roknast av keyps- ella framleiðsluprísinum (u/MVG). Lækking av keypsprísinum við 20% fyri hvørt **heilt** ár, ið er liðið síðani keypsdagin, er **ikki** galdandi her. Sum dømi kunnu nevnast málningar, standmyndir, ektað teppi o.s.fr.

Øðrvísi mannagongd er, tá ið tosað verður um íløgugøgn, sí niðanfyri.

**Javning av íløgugøgnum við avhending**
Tá ið íløgugøgn verða avhendað eftir §13 í Kunngerð nr. 35 frá 20. mars 2000 frá Fíggjarmálaráðnum um lutfalssligan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald og um javnan av inngangandi avgjaldi av íløgugøgnum, skal tað meirvirðisgjald, ið virkið dróg frá, tá keypt varð, javnast. Ongin javning er av rakstrargøgnum, hvørs keypsprísur u/MVG er undir kr. 20.000, og heldur ikki fyri rakstarargøgn, ið ikki eru undir virðisminking.

Javnast skal eisini, um íløgugøgn fara til privata nýtslu.

Íløgugøgn eru:

- Maskinur, innbúgv og onnur rakstrargøgn, hvørs keypsprísur, ikki íroknað meirvirðisgjald fer uppum kr. 20.000 kr., og sum er undir virðisminking.
- Føst ogn.
- Uppí- og umbygging ella nútímansgerð av fastari ogn.
- Umvæling og viðlíkahald av fastari ogn fyri eitt samlað meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi uppá meiri enn 50.000 um ári.

Meirvirðisgjald, ið skal javnast, verður roknað út frá tí meirvirðisgjaldsupphædd, sum virkið hevur drigið frá, tá viðkomandi íløgugøgn vórðu keypt. Meirvirðisgjaldsupphæddin skal lækkast við 20% fyri hvørt roknskaparár, ið er liðið síðani keypið. Tað roknskaparárið, íløgugøgnini vórðu keypt, skal íroknast. Eru meira enn 5 roknskaparár liðin síðani keypið viðvíkjandi maskinum, innbúgvi og øðrum íløgugøgnum, skal ikki javnast. Fyri fasta ogn eru tað 10 roknskaparár. Javning skal ikki gerast, um so er, at broytingin í frádráttarprosentinum er minni enn 10% í mun til frádráttarprosentið, tá ið keypt var.

Við avhending av íløgugøgnum sambært MVG-lógini §12, stk. 5, kann seljarin í einum javningartíðarskeiði avhenda skylduna at javna heilt ella lutvíst til keyparan, um hesin er meirvirðisgjaldsskrásettur og skrivliga váttar (skjal M38), at hann vil átaka sær javningina.

Um keyparin í minsta lagi hevur sama frádráttarrætt á avhendingardegnum, sum seljarin hevði fyri íløgugøgnini á keypsdegnum, kann keyparin yvirtaka alla skylduna at javna.

Um frádráttarrætturin hjá keypara harafturímóti er minni, tá ið íløgugøgnini verða avhendað, enn frádráttarrætturin hjá seljara var, tá ið hann keypti íløgugagnið, kann keyparin yvirtaka ein part av skylduni hjá seljara at javna, ið svarar til frádráttarrættin hjá keypara. Restin av skylduni at javna skal gerast av seljara, sum skal gjalda upphæddina til TAKS.

Upphæddin at javna hjá keypara skal skrivast í teig 7e ella 7f. Oyðublað M38 skal eisini útfyllast og leggjast við.

Upphædd at javna hjá seljara skal skrivast í teig 7g. Upphæddin hjá seljara skal eisini gjaldast til TAKS.

**Teigur 8 - Føst ogn**
Uppgerð av upphæddini, sum skal javnast í sambandi við fasta ogn, verður í høvuðsheitum gjørd á sama hátt, sum tá talan er um íløgugøgn sí teig 7.

**Teigur 9 – Annað/Viðmerkingar**
Eru nakrar viðmerkingar til uppathaldið, kunnu tær skrivast her.

**Keldur til vegleiðingina**
MVG-lógin, serliga § 11,stk 4 og § 12 stk. 5. Kunngerð nr. 35 frá 20. mars 2000 frá Fíggjarmálaráðnum um lutfalsligan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald og um javnan av inngangandi avgjaldi av íløgugøgnum, serliga § 10 og 13.